# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Støðan, 1. deild menn**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 7 | 5 - 0 - 2 | 548 | 433 | 115 | 21 |
| 2 Neistin | 6 | 6 - 0 - 0 | 529 | 450 | 79 | 21 |
| 3 StÍF | 6 | 4 - 0 - 2 | 521 | 451 | 70 | 19 |
| 4 Kyndil | 6 | 4 - 0 - 2 | 508 | 441 | 67 | 15 |
| 5 KÍF | 7 | 3 - 0 - 4 | 432 | 539 | -107 | 7 |
| 6 H71 | 7 | 1 - 0 - 6 | 445 | 537 | -92 | 4 |
| 7 Tjaldur | 7 | 0 - 0 - 7 | 459 | 591 | -132 | 3 |

# Verri verður tað ikki

*Hetta er vónandi niðurstøðan, sum ein kann gera sær, eftir at hava sæð dystin týskvøldið, har hoyvíkingar góvu eitt fínt dømi upp á, hvussu hondbóltur ikki skal spælast*



*Venjarin hjá vestmenningum, Hjalmar Klein Olsen, var fyri fyrstu ferð í fleiri dystir aftur at síggjaá vøllinum, tá VÍF mikukvøldið vitjaði hjá H71*

JÁKUP MØRK

H71-VÍF 17-29 (14-14)

Tá farið varð í Ítróttarhøllina á Hálsi mikukvøldið var sum so ikki tann stóri ivin um, at vestmenningar fóru at vinna tryggan sigur á hoyvíkingum.

Ikki tí, fleiri ferð í ár hevur verið nær við, at okkurt av niðaru støddu liðunum hevur megnað at skapt eina sensatión, men kortini er hendan ikki komin enn. Sannlíkindini fyri, at hon skuldi koma í hesum dystinum, vóru tó ikki serliga stór, og eftir dystin var tað skorið út í papp, at munurin millum topp og botn er øgiliga stórur.

## Rótut í fyrra

Ikki tí, i fyrra hálvleiki sást lítið til, at liðini eru í hvør sínum enda á stigatalvuni. Hetta var tó ikki nakran hátt orsakað av, at hoyvíkingar spældu væl, men heldur tí vestemenningar tóku heldur lætt upp á uppgávuni.

Spælið hjá VÍF batnaði heldur ikki, sum hálvleikurin leið, og móti endanum av fyrstu 30 minuttunum hevði ein varhugan av, at hoyvíkingar veruliga trúu uppá, at tað kundi lata seg gera at basa vestmenningunum.

Kortini vóru onkur tekin um, hoyvíkingar ikki fóru at knógva VÍF. Tvær ferðir vóru teir í yvirtal móti ávíkavist fimm og seks vestmenningum, men hvørga ferð eydnaðist tað heimaliðnum at fáa fyrimun burtur úr hesum.

Tað var nærum ótrúligt at síggja, at hóast vestmenningar bert høvdu fýra útileikarar, so megnaðu hoyvíkingar ikki at spæla verjuna tunna, men royndu framhaldandi at sleppa bóltin inn á strikuna, har Bárður var umgyrdur av tveimum mótstøðuleikarum. Býtt, ótaktiskt og beinleiðis vánaligt hondbóltsspæl.

## Skomm

Í hálvleikinum hevði Hjalmar Klein Olsen helst skeldað leikarar sínar eitt sindur. Í hvussu so er var nú sjónligt, at teir nú tóku uppgávuna í nógv størri álvara, og skjótt fór hetta eisini at geva úrslit.

Serliga í verjupartinum gjørdist nú nógv tættari, og beinanvegin byrjaðu teir at draga frá heimaliðnum. Fyrstu løtuna gekk tó rímuliga javnt á, men eftir at H71 skoraði til 16-18 gingu 22 minuttir til teir aftur sóu bóltin í vestmannamálinum.

22 minuttir er ófatuliga long tíð í einum hondbóltsdysti, men hoyvíkingarnir skulu eisini eiga, at teir spældu ófatuliga vánaligt. Ikki var líkt til, at orkan var serliga góð, og tá hugurin til at spæla als ikki er til staðar, so kann tað nærum ikki ganga øðrvísi. Seinasta málið fingu teir enntá, meðan vestmenningar enn eina ferð vóru fýra á vøllinum, tá leikandi venjarin hevði verið ov skjótur inn á vøllin, eftir at hann hevði fingið eina útvísing.

Ein skuldi kanska trúð, at vestmenningar veruliga vundu seg upp, og at teir tískil fingu so greiða yvirvág, men so var ikki. Vestmenningar gjørdu so avgjørt ikki meira enn neyðugt, tí tørvur var als ikki á hesum. Avrikið hjá mótstøðuliðnum var so vánaligt, at tað satt at siga er stor skomm.

## Ikki mintur fyri spælið

Nei, dysturin mikukvøldið verður so ikki verandi í minninum orsakað av góða spælinum. Heldur fer minnið at festa seg við, at hoyvíkingar bert megnaðu at skora tríggjar ferðir í 30 minuttir, ella at Sjúrður Holm nærum gjørdist toppskjútti fyri vestmenningarnar. Ja, summir áskoðarar tosaðu enntá meira um, hvussu dómararnir vóru ílætnir, heldur enn at tosa um spælið á vøllinum.

## Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
H71: Bárður Brimvík 5, Eyðun Højgaard 4, Olaf Vestergaard 3 (1), Halgir Dahl Olesen 2, Tróndur Vatnhamar 2, Rene Dahl Olesen 1 (1)
VÍF: Ingi Olsen 8, Sjúrður Holm 6, Sámal Joensen 5, Agnar Joensen 4, Martin Hummeland 2, Johnny Joensen 2, Eli Müller 1
**Brotskøst:**
H71 4, VÍF 1
**Útvísingar:**
H71 3, VÍF 5
Dómarar úr Neistanum/**Kyndli:**
Kristian Johansen og Gunnar Gregoriusen




# Lívstryggingin stuðlar ÍSB

*Týsdagin skrivaðu Føroya Lívstrygging og Ítróttasambandið fyri brekað undir stuðulsavtalu*

Týsdagin skrivaðu Ítróttasambandið fyri brekað stuðulsavtalu við Føroya Lívstrygging. Í samband við at avtalan varð undirskrivað, var tíðindafundur í ÍSF-húsinum.

## Nógv virksemi

Formaðurin í ÍSB, Jógvan »Egga« Jensen, flutti fram røðu, har hann takkaði Føroya Lívstryggin fyri, at teir vildu stuðla sersambandinum. Eisini vísti hann á, at nógv spennandi tiltøk eru á skránni seinni í ár. Longu í mars mánaði fara rørslutarnaðir svimjarar at taka lut í NM, sum verður í Greve. Í mei mánaði fer føroyskt ferðalið til NM í Bocia, sum verður í Íslandi. Fyrst í juni fara átta ítróttafólk til Hollands, har tey skulu luttaka í Special Olympics, sum eru loympisku leikirnir hjá menningartarnaðum.

Í september fara føroyingar os til Svøríkis at kappast, har NM í stavbólti fyri menningartarnað stendur á skránni.

Síðst, men ikki minst, skulu so tvær føroyskar svimjigentur til Paraolympisku leikirnar, sum verða hildnir í Sydney, beint eftir at Olympisku leikirnir eru lidnir í heyst..



## Skapa karmarnar

Umframt hetta, so skipar ÍSB fyri nógvum kappingum í Føroyum, og formaðurin vísti m.a. á, at seinni í ár verður FM í boccia, svimjing og frælsum ítrótti.

Formaðurin í Føroya Lívstrygging, Bartal Kass, segði, at Føroya Lívstrygging sá fram til eitt gott samstarv. Hann vónaði at henda stuðulsavtalan kundi verða við til at skapa karmarnar um virksemið hjá ÍSB. Sum hann málbar seg, so hava vit øll tørv á nýggjum avbjóðingum, eisini tey, ið hava brek.

Stuðulsavtalan er fyribils galdandi í tvey ár, og eru báðir partar sera væl nøgdir við sáttmálan. Umframt fíggjarligan stuðul letur Føroya Lívstrygging sersambandinum venjingarbúnar, pappír og brævbjálvar.



# Feløgini fáa pengarnar

*Tey, sum hava flest venjarar og dómarar við útbúgving fara at fáa størsta partin av veddingarpengunum*



*Fótbóltssambandi hevur nú gjørt av, at veddingarpeningurin frá ÍSF skal eggja feløgunum í í teirra arbeiði at menna venjarar og dómarar*

Tað verður roknað við, at Fótbóltssambandið árliga fer at fáa 400 túsund krónur burturúr tí partinum av veddingaryvirskotinum, sum nú fer at koma úr Danmark og til Føroya.

Stjórnin í ÍSF hevur gjørt av, at FSF skal fáa tillutað 12/70 partar av samlaðu veitingini, og tað er hetta, sum verður mett at fara at verða 400 túsund krónur árliga.

Á aðalfundinum leygardagin segði Torleif Sigurðsson, at nevndin í FSF hevur samtykt, at feløgini skulu fáa størsta partin av pengunum. Roknað verður við, at trý hundrað av teimum fýra hundrað túsund krónunum skulu lutast feløgunum.

Sum grundgjald fer hvørt limafelag í FSF at fáa fimm túsund krónur, ið standa at verða markaðar til menning av samskipanarvirksemi. Fimm hundrað krónur verða latnar fyri hvørt ungdómslið, sum feløgini eru umboðað við í kappingini.

Harafturat er tað partur av samtyktini, at venjaratalið í ungdómsdeildunum skal ávirka veitingina. Treytin fyri at fáa pengar fyri venjararnar er, at venjararnir hava venjaraútbúgving. Um ein venjari bert hevur A grundskeiði, so fær felagið eitt hundrað krónur fyri hann. Um venjarin hevur lokið øll fimm grundskeiðini, so fær felagið fýra hundrað krónur fyri hann, og um venjarin harafturat hevur lokið prógv sum ungdómsvenjari, so verður útgoldna upphæddin átta hundrað krónur.

Feløgini fáa eisini pengar fyri hvønn virknan dómara, sum hevur dómaraútbúgving. Upphæddin fyri hvønn verður fimm hundrað krónur.

Á aðalfundinum leygardagin fingu feløgini skjal, sum skal útfyllast og sendast FSF innan 1. oktober í kappingarárinum. Eftir at útfylta skjalið, sum skal undirskrivast av leiðsluni í felagnum, er góðkent í FSF, verða pengarnir góðskrivaðir kono felagsins hjá FSF.

JH

# Eitt ættarlið farið

*Jens Albert Simonsen er nýggjur altjóða skrásettur hjálpardómari í fótbólti*

Tá Torleif Sigurðsson, formaður í Fótbóltssambandinum, leygardagin legði munnligu ársfrágreiðingina fyri ársaðalfundin, nevndi hann, at Jens Albert Simonsen er nýggjur hjálpardómari á FIFA listanum. FSF hevur innstillað Jens Albert, og FIFA hevur góðkent hann.

Umframt nýggja hjálpardómaran eru tríggir aðrir føroyingar á altjóða listanum. Teir eru Lassin Isaksen, dómari, og hjálpardómararnir Jón Kári Frederiksen og Tummas Pauli Olsen.

Jens Albert Simonsen er vorðin altjóða hjálpardómari, eftir at Andreas Poulsen av persónligum orsøkum hevur ynskt at sleppa burturúr. Torleif Sigurðsson veitti Andreasi eina stóra tøkk fyri tað ágrýtni, sum hann hevur sýnt í dómarastarvinum.

## Allir farnir frá

At tað gongur skjótt her í verðini og ikki minst í fótbóltsheiminum er føroyski leikluturin í altjóða døming góð ábending um. Fyri góðum átta árum síðani vórðu fyrstu føroyingarnir góðkendir sum altjóða dómarar og linjuverjar ella hjálpardómarar, sum tað nú verður nevnt. Í fyrstu atløgu vórðu ein dómari og tveir hjálpardómarar útnevndir. Seinni varð ein hjálpardómari útnevndur afturat, og nú eru allir hesir fýra givnir á altjóða pallinum.

Nemus Napoleon Djurhuus varð útnevndur altjóða dómari í juli 1991, og hann dømdi fyrsta dystin – ein U 16 landsdystur millum Noreg og Ungarn – 25. september í 1991. Í desember í 1991 vórðu Niklas á Líðarenda og Jóhan Carl Dam útnevndir hjálpardómarar, og árið eftir fekk Andreas Poulsen sama heitið. Nemus og Jóhan Carl eru givnir at døma. Í fjør stóð Niklas ikki á altjóða listanum. Hann dømdi kortini í heimligu kappingunum, og nú fyrireikar Niklas seg til eitt nýtt kappingarár í Føroyum. Nú Andreas Poulsen er givin, kunnu vit staðfesta, at allir teir fyrstu fýra eru avloystir av fýra nýggjum monnum.

JH



# Aftur til Noregs

*Fyrr í ár fór John Heri Dam til Noregs at venja, og nú er sáttmáli undirskrivaður*

JÁKUP MØRK

Fyrr í vetur fóru teir báðir, John Heri Dam og Rúni í Soylu til Noregs, har teir í eina tíð skuldu royndarvenja við norska felagnum, Jotun, sum liggur í triðbestu norsku deildini.

Fremsta orsøkin til, at tað júst var Jotun, sum teir báðir vandu við, var, at venjarin hjá felagnum er fyrrverandi landsliðsleikari okkara, Kári Reynheim.

Í fyrsta umfari var avtalan bert, at teir báðir skuldu venja við norska felagnum. Í farnu viku vóru teir so aftur at síggja her á klettunum, og meðan Rúni verður verandi her heima fyri fyrst, fer John Heri avstað aftur í komandi viku.



Semja er millum felagið og føroyska leikaranum, at hann komandi árið skal royna seg hjá teimum.

## Royna okkurt nýtt

Sjálvur sigur John Heri, at hetta mest er fyri at royna nakað nýtt, nú hann fer at royna seg í grannatjóðini komandi árið.

Peningaliga er talan ikki um tær stóru upphæddirnar, men hinvegin hevur felagið útvega honum arbeiði, so hann roknar við, at tað skal nokk ganga.

Nú vetrarkuldin rættuliga ger um seg har yviri, hava teir fyri tað mesta vant í høllini hjá Sogndal, har fleiri aðrir føroyingar sum kunnugt royna seg Sum skilst er talan um rættuliga góðar umstøður. Høllin, sum Sogndal fyri stuttum hevur latið bygt, kostaði ikki minni enn 90 mió.kr., so tað er ikki tað sama, sumat venja innandura her heima..

Norska kappingin fer í gongd móti endanum av apríl mánaði, so spennandi verður at síggja, hvussu føroysku leikararnir í Sognefjord fara at roynast.

# EM kapping í Føroyum

*FSF verður í juli vertur fyri EM undankapping fyri U–18 kvinnurnar*

Í juli mánaði verður ein EM undankapping í Føroyum. Lutakastið í heyst lagaði tað soleiðis, at Føroyar komu í bólk saman við Ukreina, Skotlandi og Sveits. Á ársaðalfundinum hjá Fótbóltssambandinum leygardagin upplýsti Torleif Sigurðsson, at tað er avrátt, at kappingin skal vera í Føroyum frá 9. og til 15. juli í summar.

Avtalur eru gjørdar við Álv Hansen og Jón Harald Poulsen um, at teir skulu halda fram sum ávikavíst venjari og hjálparvenjari hjá U–18 kvinnulandsliðnum.

Bæði í fjør og í fyrraárið vóru EM undankappingarnar hjá U–18 kvinnunum í Onglandi. Bæði í 1998 og í 1999 vóru kappingarnar í november, og teir báðir omanfyri nevndu venjararnir høvdu ábyrgdina bæði árini. Í fjør var føroyska liðið millum annað í bólki saman við Ukreina, sum tað eydnaðist at spæla 1–1 ímóti.

JH